# Hósdagur 14. juli

JÓGVAN NICLASEN staðfestir, at hann er besti bogaskjúttin í compound á Oyggjaleikunum hesaferð, tá ið hann vinnur gull í head-to-head skjótingini. Absalon Hansen fær silvur í recurve. Schandorff Vang vinnur bronsu í compund, tá hann vinnur dystin ímóti Per Holm Andersen.

BOGASKJÚTTARNIR gera bart í liðkappingunum í head-to-head skjótingini. Bæði í recurve og compound vinna føroysku liðini gull.

HERI ZISKA klárar ikki at verja gullmerkið hjá sær í diskos-kappingini. Hann hevur ein ringan dag og endar uttanfyri heiðursmerkjaplássini.

GUÐRI POULSEN og Erland Poulsen koma í fjórðingsfinaluna í blandaða tvímansleikinum í badminton, men tey tapa fyri einum sterkum hetlendskum pari.

FØROYAR vinda burtur úr vertstjóðini Hetlandi í fótbóltsdystinum hjá kvinnum. Føroyar vinna heili 9-1.

MARIUS JOENSEN vinnur bronsu í skjótikappingini í skeet. Hann liggur væl fyri seint í kappingini, men missir okkurt av seinastu skotunum og endar tí nummar 3.

ANDRAS THOMSEN vinnur silvur í 200 metra frísvimjing, og í 50 metra frísvimjingini vinnur Kristian Olsen silvur. Elspa Møkøre vinnur silvur í 100 metra ryggsvimjing. Í stafettini hjá kvinnum í fýra ferðir 100 metra blandað svimjing vinna Føroyar bronsu. Í óalmennu stafettini 8 ferðir 50 metra frísvimjing enda Føroyar nummar 2.

FJÓRÐU ferðina á rað vinnu flogbóltskvinnurnar gull, tá ið tær vinna spennandi finaluna ímóti Saaremaa 3-2. Menninir fáa nakað av uppreisn, tá ið teir vinna bronsudysti ímóti Álandi sannførandi 3-0.



*Hesin helt, at stuttleikin skuldi við aftur í svimjingina*





*Marius Joensen stóð seg sera væl í skeet-skjótingini*



*Seinasti bólturin í kvinnufinaluni í flogbótli. Gudrid Nolsøe smasjar og Føroyar vinna*



*Tað gekk ikki eftir vild hjá Hera Ziska í diskos-kasti*



*Bóltur og bein – føroysku fótbóltskvinnurnar vinna aftur*



*Annika Vang og Absalon Hansen jubla eftir sigurin í liðkappingini í recurve*